

# Hevur gingið í 25 ár

**Í morgin eru 25 ár liðin síðan Deiggj fyrstu ferð fór á pallin, jubileumið verður hátíðarhildið við ókeypis dansikvøldið í Tvøroyrar Klubba, har alt byrjaði**

NØVN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Mikudagin, ella sum tey siga har suðuri onsdagin 6. september hevur tónleikabólkurin Deiggj 25 ára jubileum. Sunnudagin 6. september í 1981 fóru Páll Lave, Dennis Lave, Fróði Vestergaard, Pætur Dam, Dávið Jakobsen og René Jespersen fyrstu ferð á pall saman í Tvøroyrar Klubba.

- Hetta er gott nokk eitt sunnukvøld, So okkurt serligt hevur verið á Tvøroyri tað kvøldið. Kanska hevur TB vunnið onkran dyst tann dagin, greiðir Fróði Vestergaard gittarleikari og sangari frá.

Í sambandi við føðingardagin fer Deiggj suður aftur at spæla.

- Vit ætla at markera dagin við at skipa fyri einum ókeypis dansikvøldið í Tvøroyrar Klubba, tí tað var har hetta byrjaði, sigur Fróði.

Hesi 25 árini hava nógvar broytingar verið í manningini. Men seinnu árini eru partar av uppruna manningini komnir við aftur. Í dag er Deiggj: Páll Lave, Dennis Lave, Pætur Dam, Fróði Vestergaard og teir báðir nýggju Sverri Heinesen, ið hevur spælt við í 6 ár og Herluf Hermansen, ið eisini spældi í Deiggj eitt skiftið í 90'árunum.

### Virkin dansibólkur

Fróði minnist aftur á fyrstu árini við Deiggj fyrst í 80'árunum.

- Vit spældu sera nógv tvey tey fyrstu árini, umleið 50 kvøld um árið. Tá eg flutti niður í 1983, hildu hinir fram og fingu Jón McBirnie við sær.

### Vit eita bara Deiggj

Tá Fróði í 1985 kom við løgum, til fyrstu útgávuna hjá bólkinum, vóru hesi eitt sindur øðrvísi enn tann stílurin, sum bólkurin annars spældi.

- Tá ið vit fóru í studio, var mítt ynski, at útgávubólkurin skuldi eita Deiggj. Aðrir hildu at vit skuldu eita "Blandað Bomm". Tað bleiv so til eitt kompromis Fróði & Deiggj, so kundu vit samstundis halda fast í Deiggj navninum. Vit høvdu nokk ikki væntað, at hetta fór at hava so stóran týdning fyri navnið hjá bólkinum. Tí enn hava fólk hug til at kallað okkum Fróði & Deiggj. Hetta hóast vit bert hava brúkt navnið á plátuni og einari konsert, sum vit spældu saman við Frændum í 1986, sigur Fróði og slær fast:

- Vit eita Deiggj og bara Deiggj!.

### Aja

LP'in hjá Fróða og Deiggj fekk góða móttøku millum føroysku plátukeypararnar. Løg sum Prúða Land Mítt, Slatur og Reggae lagið Aja, hava fingið sítt pláss í føroyskari tónleikasøgu. Aja og Slatur vóru seinni við á einari savnsfløgu hjá HCW. Meðan "Prúða land mítt" er við á Ung um Aldarmótið 2.

Størsta hittið hjá Deiggj, kom fyrst í 90'árunum, tá lagið Tillukku, av Amnesty Tónum gjørdist kvøðuljómaslagari., annars hevur bólkurin spælt løg á fløgunum TB 100 ár, Útvarpsfløguni Sov blítt og søtt, á Livandi Tónleiki, ið FUT gav út og á fløguni Vælskapt brek hjá Javna

Í tíðini eftir, at LP'in var komin út, var Deiggj mest virkin sum bólkur í feriunum. Teir spældu nógv um summarið og á jólum. Á jólum í 1986 spældi Deiggj t.d. 5 kvøld á rað í TB-húsinum.

### Úr Suðuroyar Grand Prix til Asfalt

Hesi 25 árini hevur Deiggj spælt til nógv tiltøk, ofta til dans, men eisini á nógvum konsertum, og nú festivalarnir eru komnir á breddan er Deiggj eisini við. Bólkurin var á Jóansøkufestivalinum í fjør og á Asfalt í ár. Fróði Vestergaard hevur øll árini verið primus motor í fyriskipanini av Prix Føroyum, og hetta man vera orsøkin til, at Deiggj ongantíð hevur luttikið í hesi kapping. Men teir hava vunnið eitt prix.

- Vit vunnu Suðuroyar Melodigrandprix í 1983. Vinningurin var ein ferð til London at spæla á onkrum smærri klubbum. Ferðin bleiv ongantíð av nøkrum, m.a. tí at vit ikki kundu semjast um navnið. Men høvuðsorsøkin var kanska, at tann sum skuldi gera avtalur í London ikki fekk nakað konkret í lag, sigur Fróði, ið tó heldur, at tað var stuttligt at hava ein fund, um bólkurin skuldi eita Deiggj ella Dough.

### Deiggj er eitt vinarlag

Nógv fólk hevur verið við hesi árini, nevnast kunnu Stamen Stantchev, Rúni Brattaberg, Kaj Johannesen, Jón Gaasedal, Bjartur Hansen, Einar Jacobsen, Dánjal Jákup Holm, Jón McBirnie, Reidar Nónfjall, umframt nógvar avloysarar, ið hava verið við eina ella tvær ferðir.

- Vit høvdu í 1982 eina enska songkvinnu, Diana Malpas, Pápin var venjari hjá Tvøroyrar Hornorkestrið. Hon sang sera væl og perfekt enskt sjálvandi.

- Deiggj er eitt vinarlag, hetta merkir at man saktans kan verða deiggjari uttan at spæla við Deiggj, eitt nú feðast vit saman við konum og børnum, og tá er Dávið eisini við okkum, hóast hann ikki spælir við longur. Seinast við vóru uttanlands var í summar, tá ið vit vóru í Fraklandi og sigldu á kanalunum.

Summir hava verið vekk í nóg ár og eru síðan komnir aftur í bólkin t.d. Pætur Dam í 13 ár Páll í 8 ár, og Fróði og Dennis í nøkur ár.

### Rokka á Ellisheiminum

Deiggj venur fast einaferð um vikuna og hevur egin venjingarhølið og sera góða og tíðarhóskandi útgerð!. Í næstum fer Deiggj á alneti, bólkurin hevur ætlanir um at gera eina heimasíðu, men hava enn ikki funnið nakran at gera hana. Hon fer at liggja á www.deiggj.com.

-Um okur hava lív og heilsuna so fara okur at rokka víðari, vónandi líka leingi sum Rolling Stones og aðrir góðir bólkar. Tað verður stuttligt at spæla Smoke On The Water á Ellisheiminum, sigur Fróði.




**Buffét**
*ÚTSETT*
5 dagar, Skúlaheimið við Marknagilsvegin
Á skeiðnum verður arbeitt við at tilrættaleggja og at matgera til buffét'ir. Skeiðið er skipað soleiðis, at maturin, ið verður gjørdur á skeiðnum, verður serveraður fyri gestum. Skeiðsluttakarin fær innlit í reinførisviðurskiftir í einum stórkøki og ein varhuga av arbeiðsumhvørvinum í einum stórkøki.
Skeiðsleiðari: Martin Restorff

**Steinseting**
*16. – 20. okt.*
Á skeiðnum verður arbeitt við tekningum, góðskuni av arbeiðnum og undirlagið. Arbeitt verður eisini við eini praktiskari steinsetingruppgávu, ið verður eftirmett eftir DS 1136.
Skeiðsleiðari: John Hvass
Tilmelding innan 2 okt.

**AutoCad innleiðsla**
*19. – 20. okt.*
Skeiðið er ætlað teimum, ið ikki eru von við at arbeiða við teldu. Á skeiðnum verður arbeitt við mús og knappaborði. Lært verður at starta forritið og at byrja eina nýggja tekning, um brúkaraflatuna, amboðs- og kommandolinjur og at skriva kommandoðir. Arbeitt verður við, at tekna einklar uppgávur.
Skeiðsleiðari: Marita Hentze
Tilmelding innan 2 okt.

**AutoCad grundskeið**
*26. – 27. og 30. – 31. okt.*
Lært verður um funkurnar á 2D støði og tilrætta-legging av tekniuppgávum.
Skeiðsleiðari: Marita Hentze
Tilmelding innan 6. okt.

**Betong armering**
*30. okt. – 3. nov.*
Undirvíst verður í grundleggjandi vitan um eginleikarnar á jarnbetongi, trekk og trýstviðurskiftir, ymisk sløg av armeringum, krøvum til bukkidiametur, betongløgum, støðlongdum og ankring. Arbeitt verður við at tilevna og seta vanliga armering eftir tekning.
Skeiðsleiðari: Heðin Gásadal
Tilmelding innan 16. okt.

**Innleiðsla í sveising**
*6. – 17. nov.*
Skeiðslutakarin arbeiðir við einføldum sveisistøðum við elektrodu, gass-, TIG, MIG/MAG-sveisiháttunum. Endamálið við skeiðnum er at læra á grundleggjandi støði um sveising, sveisiteori, umhvørvi og trygd og nýtslu av tólum og amboðum.
Skeiðsleiðari: Jeffri Olsen
Tilmelding innan 23 okt.

**Skeið í reingerð**
*16. - 17. - 30. nov. og 6. des.*
5 dagar, Skúlaheimið við Marknagilsvegin
Á skeiðnum verður arbeitt við reingerðarevnum, tólum og amboðum, umhvørvi og ergonomi. Mátingar og royndir verða gjørdar av ymiskum evnum, tilfari og amboðum. Í uppgávum verða útrokningar gjørdar, sum skulu vísa, um tað verkliga besta eisini er tað fíggjarliga besta.
Skeiðsleiðari: Kristianna Rein

**Make Up skeið**
*Skeiðið er skipað yvir 8 kvøld, mána- týs- miku- og hóskvøld frá kl. 19 til 22 í døgunum 5. til 15 feb.*
Evnini á skeiðnum verða: húðanalysa, andlitsformar, litlæra, dag make-up, kvøld make-up, brúðar make-up og "smokey eyes"
Skeiðsleiðarar: Sunneva Thorsteinsson og Unn Zachariassen
Tilmelding innan 22 jan.

www.skeidsdepilin.fo
tilmelding á heimasíðuni
ella á telefon 318 813